

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 10 - 2012

# Vænta lægri oljuprís

Altjóða orkustovnurin IAEA væntar, at oljuprísurin fer at fella tey næstu fimm árini. Orsøkin er, at búskaparvøksturin verður lítil hesi árini, samstundis sum orkan verður betur gagnnýtt. IAEA, sum virkar sum orkupolitiskur ráðgevi hjá vesturlendskum stjórnum, roknar við, at hetta til 2016 fer tørvurin á olju at veksa umleið eina hálva millión tunnur minni um dagin, enn stovnurin metti, tá hann gjørdi ta seinastu metingina í desember fjør. Hetta fer at hava við sær, at trýstið á OPEC-londini at økja framleiðsluna fer at minka nógv. IAEA metir, at kravið til OPEC verður 31 milliónir tunnur um dagin hetta til 2017. Tað er minni, enn OPEC-londini framleiða í dag.